HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Eftirlitsfólk til fiskasjúkuøkið

2 størv sum eftirlitsfólk á fiska- og djórasjúkudeildini eru leys at søkja, til setan 1. mai 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Bæði størvini fevna um:**
- Eftirlit og sýnistøku sambært kunngerð nr. 20 frá 14.03.2005 um koppseting fyri ILA.
- Málsviðgerð í hesum sambandi.
- Luttøku í øðrum eftirlitsarbeiði hjá fiska- og djórasjúkudeildini.
- Annað.

**Fakligt krøv**
- Hvørja útbúgving, tú hevur, er sum so ikki tað týdningarmesta, men vit hugsa um útbúgvingar sum laborantur, bioanalytikari, laboratoriuteknikari, fiskivinnutøknikari, útbúgving á B.Sc. stigi t.d. í lívfrøði ella tilsvarandi.
- Koyrikort til bil er eitt krav.

**Fyrimunir**
- Royndir innan alivinnuna, eftirlitsarbeiði sum heild, innaneftirlitsskipanum, sýnistøku o.t. eru ein fyrimunur.
- Góður kunnleiki til framkomnar telduskipanir.
- Góð samstarvsevni, nærlagni, evni at tosa við fólk, umframt at duga at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst eru eisini fyrimunir.

**Vit kunnu bjóða:**
- Fjølbroytt arbeiði, har uppgávurnar eru sera ymiskar, og tú kemur nógv runt í landinum.
- Møguleikar fyri at menna teg í arbeiðnum (skeið, eftirútbúgvingarmøguleikar o.t.).

**Annað:**
- Í.s.v. eftirlitsuppgávur skal roknast við, at arbeiðsdagarnir til tíðir kunnu verða sera langir.
- Tú skalt tola broytingar í starvsinnihaldinum í sambandi við víðari menning av fiska- og djórasjúkudeildini.
- Bæði eftirlitsstørvini eru innanfyri karmarnar av játtanini til »Basan av fiskasjúkum«.

**Løn v.m.**
Størvini verða sett sambært sáttmálanum millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið, sí www.lnd.fo.

Umsóknir til bæði størvini við avritum av prógvum, eftirútbúgving, starvsroyndum og møguligum viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin hin 14. apríl 2006.

Starvslýsingin kann eisini lesast á www.hfs.fo.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Peter S. Østergaard, deildarleiðari og fiskasjúkudjóralækni, ella Bárð Enni, stjóri.

*Fiska- og djórasjúkudeildin er skipað í eina eftirlitsdeild (F&DSE) og eina kanningarstovu (F&DSK).*
***F&DSE** umsitur djórasjúkulógarverkið, og høvuðsuppgávurnar eru málsviðgerð og eftirlit. Higartil hevur arbeiðið fyri tað mesta snúð seg um alivinnuna.*
***F&DSK** er tilvísingarkanningarstova fyri fiskasjúkur og tekur sær av sjúkugreining og yvirvøku sambært djórasjúkulóggávuni, serliga av ILA-vaksineraðum alifiski. Hesin partur er væl áleiðis at blíva akkrediteraður av DANAK (sí www.danak.fo akkr. nr. 303). Arbeitt verður við at menna og íverkseta sjúkugreiningar og sjúkustaðfestingar fyri súgdjór og fugl, herundir fuglakrím.*



# YFF - Yrkisfelagið hjá fíggjarstovnum í Føroyum

**Søkir skrivstovufólk til fyrisitingina at byrja 1. mai 2006 ella eftir nærri avtalu.**

**Starvið fevnir m.a. um:**
- vanligt skrivstovuarbeiði, bókhald og roknskap
- sáttmálarøkt & samráðingar
- samskifti við nevnd og limir
- at mynda felagið úteftir

**Umframt viðkomandi útbúgving er tað umráðandi at tú:**
hevur góð samstarvsevnir
kanst arbeiða sjálvstøðugt
ert kreativ/ur og visjoner/ur

Løn og arbeiðstíð eftir nærri avtalu.

**Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:**

**YFF**
J.H. Schrøtersgøta 9
Postsmoga 225
FO-110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 18. apríl 2006.

Hevur tú spurningar til starvið, kanst tú ringja til YFF á tlf 321212 ella 521212.

YFF er nýstovnað felag hvørs endamál er at røkja áhugamálini hjá SFS – Starvsfólkafelag Sparikassana og Elektron og YT – Yrkisfelagið Trygdin, ið umboðar starvsfólkini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar og Føroya Lívstrygging. Limatalið er í løtuni um tey 400. Skrivstovan er í hølunum hjá Starvsmannafelagnum.



# Kunngerð

## Kunngerð um leysgangandi hundar

Ikki er loyvt at hava hund gangandi leysan á gøtu, vegi, breyt ella øki, ið verður nýtt til almenna ferðslu í Tórshavnar kommunu.

Hundur skal havast í bandi, og skal bandið vera so stutt, at tann, sum leiðir hundin hevur hann tætt inn at sær.

Gongur hundur leysur uttan leiðara, tekur løgreglan hundin upp og boðar eigaranum frá. Um eigarin ikki hevur gjørt vart við seg innan trý samdøgur eftir at boðað er frá, kann løgreglan avlíva hundin.

Við heimild í: Løgtingslóg nr. 82 frá 19. juni 1990 um hundar.
Kunngerð nr. 1 frá 8. januar 2003 um skyldu at hava hund í bandi í Tórshavnar og Kirkjubøar kommunu.

**Tórshavnar kommuna**

Hava tit minst til at goldið haldaragjaldið av Føroya besta blaði...!!!



Tórsgøta 1 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo
Sosialurin